

# Joey Moe til Føroyar

**Heitasta navnið í donskum R´n´B tónleiki spælir komandi vikuskiftið í Eclipse í Havn og Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Talan er um ein ungan mann, sum avgjørt gongur einari bjartari framtíð í møti.**

**Konsert**
Rókur Jákupsson Jakobsen
(rokur@sosialurin.fo)

Um vit skulu royna at lýsa Joey Moe, sum kundi ein freistast at siga, at talan er um tann danska Justin Timberlake. Joey er ein vakur ungur maður, hann syngur ein bleytan, nútímans tóna, og dansar sum ein sannur entertainari. At síggja og hoyra til, er hann ein totalur poppari. Lagið »Flip it (like a DJ)« er rættur dreingjareyvspoppur, sum vit kenna hann úr USA. Sostatt kann føroyski ungdómurin (kanska serliga genturnar) gleða seg til eina fríska og øðrvísi konsert, enn vit eru von við her heima.

Hóast bara 20 ára gamal, er Joey longu eitt stórt navn í Danmark. Hann hevur arbeitt miðvíst við dreyminum um at liva av at syngja popp í 10 ár. Tá ið Joey var 10 ár broyttist lív hansara. Tá hoyrdi hann dreingjabólkin »Backstreet Boys« fyri fyrstu ferð, og tá var ongin vegur aftur. Joey visti tá, at hann skuldi verða sangari.

Hann stovnaði bólkin »Nothing Special«, og hóast hesin bólkur ikki gjørdist nøkur risa succes, var tað í hesum bólki, at Joey veruliga menti seg sum sangara og dansara. Hann brúkti hvørja einastu fríløtu uppá at syngja og dansa, og úrslitið er har eftir. Og tað hoyrist, at hesin maðurin tekur popptónleikin í álvara. Tónleikaslagið verður av Joey sjálvum lýst sum heitur (hot) R´n´B tónleikur. At Joey telist millum tey stóru í Danmark er ongin loyna. Joey Moe hevur m.a. hita upp fyri Johnny Deluxe á konsertferð teirra í fjør, og tað er ikki hvørjum manni beskorið. Hetta var enntá áðrenn fyrsta fløgan MoeTown kom út í mars í ár. MoeTown hevur fingið sera góða móttøku í Danmark.

## Ein tilvildarligur dagur á Ráðhúsplássinum

Ein dagin gekk unglingin Joey Moe á Ráðhúsplássinum í Keypmannahavn. Har møtti hann tveimum harrum, sum eita Jon og Jules. Hesir báðir eru betur kendir sum Nic og Jay. Joey gav teimum sína demoplátu, og eitt korter seinni ringdi teir, og søgdu at teir vildu gera tónleik saman við honum. Nic og Jay hava sítt egna produsarafelag, sum teir rópa Nexusmusic, og er hetta felag forkunnugt í Danmark. Hendan dagin byrjaði ferðin hjá Joey Moe upp ímóti stjørnunum.

Tann 6. mars í ár kom úrslitið. Fløgan "MoeTown" varð útgivin, og ummælarar og almeningurin hava tikið sera væl ímóti henni. Hóast Joey er ein stjørna í heimlandinum, er hann eyðmjúkur og vil ikki leypa framav.

– Eg dugi at syngja, dansa og spæla klaver. Sostatt kann eg geva eitt heilstoypt show, tá eg spæli mín tónleik. Men eg eri ikki heimsins besti, sigur hann lítillátin

## Joey Moe er tónleikur

Joey er ættaður úr Hawaii, men er uppvaksin á Amager í Keypmannahavn. Joey sigur við www.tjeck.dk, at hansara alskur til tónleikin er sera stórur, líkasum hann hevur verið tað í fleiri ættarlið í Moe familjuni.

– Eg eri uppvaksin í einum tónlistarligum umhvørvi. Mamma mín er ein dugnalig songkvinna, og tónleikur hevur altíð verið ein partur av mær, sigur Joey við www.tjeck.dk



Mamma Joey, Lupe Moe, er ein kend songkvinna í Danmark. Hon hevur sungið saman við teimum flestu tónleikarum í Danmark, og hevur saman við systur síni, verið millum tær mest umbidnu sangarum í Danmark. Og danir hava tikið tónleikin hjá Joey Moe til sín. Fyrsta stakfløgan "Flip it (like a DJ) gjørdi um seg á donsku hitlistunum síðsta vetur, og alt bendir á, at framferðin heldur áfram. Saman við Nic og Jay, hevur Joey skapt eina nútímans fløgu, sum hevur eina góða breidd. Har eru skjót dansiløg á fløguni, og eisini eru inniligar balladur at finna á henni.

Joey Moe verður at hoyra fríggjakvøldið í Eclipse í Havn og leygarkvøldið í Mentunarhúsinum í Fuglafirði. Úr Fuglafirði verður sagt, at bussar koyra úr Havn og Klaksvík til konsertina.

Á Portal.fo undir Kykmyndir liggja tvey sjónbandaløg hjá Joey